# BILATORGIÐ

Fyrivarni verður tikið fyri villum

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**


**HONDA CIVIC 1.4 IS**
Árg jan.99, Km 53.000.
Kr. 119.000.



**KIA CLARUS 2.0I**
Árg nov.97, Km 31.000. Kr. 98.000.



**FORD ESCORT 1.6**
Árg des.95, Km 97.000. Kr. 70.000.



**FORD ESCORT 1.8 DIESEL**
Árg okt.96, Km 85.000. Kr. 75.000.



**KIA CLARUS 2.0**
Árg jul.97, Km 46.000. Kr.
105.000.

**DAEWOO LANOS 1.6**
Árg jul.98, Km 25.000. Kr. 95.000.



**HONDA ACCORD 2.0I**
Árg aug.97, Km 52.000.
Kr. 145.000.



**HYUNDAI ELANTRA 2.0I**
Árg jul.97, Km 62.000. Kr.
110.000.



**MAZDA 323 1.5**
Árg jun.99, Km 36.000.
v.aircondition. Kr. 110.000.



**HYUNDAI SONATA 2.0I**
Árg feb.99, Km 35.000.
Kr. 135.000.



**FIAT MAREA 1.6I**
Árg okt.96, Km 53.000. Kr. 95.000.



**HONDA CIVIC 1.4 IS**
Árg apr.98, Km 31.000.
Kr. 115.000.



**OPEL ASTRA 2.0I 16V**
Árg jul.96, Km 94.000. Kr.
105.000.



**HYUNDAI ATOS 1.0**
Árg mai.99, Km 31.000. Kr.
65.000.



**OPEL OMEGA 2.0**
Árg jun.88, Km 145.000.
Kr. 35.000.



**HONDA ACCORD 2.0I LS**
Árg jun.99, Km 50.300.
Kr. 165.000.



**HONDA CIVIC 1.4IS**
Árg des.96, Km 31.800.
Kr. 105.000.



**HYUNDAI 2.0I VL**
Árg apr.98, Km 56.000. Kr. 95.000.



**KIA SEPHIA 1.6**
Árg feb.97, Km 73.000. Kr. 68.000.



**SKODA FELICIA 1.9 DIESEL**
Árg feb.98, Km 144.000.
Kr. 68.000.



**FORD ESCORT 1.6 16V**
Árg nov.94, Km 100.600.
Kr. 45.000.



**OPEL ASTRA 1.7 TURBO DIESEL**
Árg jul.95, Km 109.000. Kr.
92.000.



**TOYOTA CAMRY 2.2I**
Árg jun.99, Km 43.000.
Kr. 210.000.

SKODA HONDA HYUNDAI

**NORDBIL v/ Oyggjarvegin tel 313707**



**MITSUBISHI GALANT 2,0GTI 5H**
Árg mai.89, Km 170.000.
Kr. 59.000.



**KIA SPORTAGE 2.0I 4X4 3H**
Árg okt. 97, Km 42.500. Kr. 95.000.



**NISSAN PRIMERA 2.0 SGL 4H**
Árg AUG.97, Km 29.000.
Kr. 115.000.



**MITSUBISHI CARISMA 1.8GDI LS HB 5H**
Árg jan.98, Km 62.000. Kr.
125.000.



**BMW 318I SEDAN 4H**
Árg mar.99, Km 27.000.
Kr. 205.000.



**MITSUBISHI GALANT 2,0GTI 5H**
Árg feb.92, Km 180.000. sýnaður í ´01. Kr. 65.000.



**SEAT CORDOBA DIESEL STC. 5H**
Árg aug.99, Km 35.500.
Kr. 125.000.



**MMC PAJERO 3H**
Árg SEP.86, Km 208.500. sýnaður í ´01. Kr. 45.000.



**CITROEN XANTIA 1.9TD 5H**
Árg jun.98, Km 101.000.
Kr. 135.000.



**MMC LANCER 1.5 GLXI 5H**
Árg mai.92, Km 145.000.
Kr. 57.000.



**FIAT TIPO 5H**
Árg mai.89, Km 108.500.
nýsýnaður. Kr. 26.000.



**MAZDA E2200 VØRUV.**
Árg mar.97, Km 91.500. nýsýnaður.
Kr. 95.000.



**FORD SIERRA 2.0I CLX 4H**
Árg 1.991,00, Km 110.000.
Kr. 45.000.



**CITROEN JUMPY 2.0 HDI 4H**
Árg des.91, Km 20.000. nýsýnaður.
Kr. 160.000.



**PEOGEOT 306D 4H**
Árg apr.95, Km 150.000. Kr.
80.000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI

**Ivan Johansen Bilar**
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo

**PEUGEOT 306 XL**
Árg Jul-95, Km 68.000. Kr. 65.000.

**VW GOLF III**
Árg Jun-92, Km 121.000. Kr.
93.000.

**AUDI A4 SEDAN SILVUR**
Árg 68.000, Km 150.000. .

**FORD ESCORT 1,8 TOURER**
Árg Mei-96, Km 69.000. Kr.
80.000.

**TOYOTA COROLLA**
Árg Mar-85, Km 256.000. Kr.
32.000.

**VW VENTO TURBODIESEL**
Árg Feb-95, Km 119.000. Diesel. Kr.
132.000.

VW Audi SEAT

**Bilasølan v/ Øssur Johannesen**
**tel 315354 - www.audi-vw.net**

Lýsið í bilatorginum



**FIAT**
Árg. 98, km 75.000, v. 14"
sportfelgum, 18-20 km/litur
*252677*






*Stórur sær Teistin út í Havnini í Hesti, men havnin er eisini so stór, at havnin í Skopun kundi ligið inni í henni*



*Teistin hevur ongan trupulleikar at sigla inn og út úr havnini í Hesti*



*Eyðun Holm, ein av mest garvaðu skiparum hjá Strandferðsluni, er skipari á Teisanum*

Teistin siglir endiliga í Hest:

# Morguntúrurin er heilt avgerandi

SAMFERÐSLA

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*
*Myndir: Jens K. Vang*

Týsdagin fór Teistin undri regluliga sigling í Hest og Sosialurin var við á øðrum túrinum. Teistin smeyg sær sum ein állur lætt og elegant yvir Hestfjørð og legði at í Hesti, eins lætt og ein bilur parkerar á einum rúmligum parkeringsplássi.

- Og morguntúrurin er altavgerandi skulu ung fólk støðast í bygdini, sigur Hallur Johannesen, sum er uppvaksin í Hesti, men fór sum 19 ára gamal til Havnar at læra.

- Tey ungu, sum fara úr Hesti at ganga í framhaldsskúla í Havn og síðan enda í Hoydølum, hava verið seks ár burtur, tá tey eru liðug og tá er sambandið við heimbygdina kvett med alla og heimbygdin verður ikki annað enn staðurin ein vitjar aftur til høgtíðir og í feriu, sigur Hallur Johannsen. Hann tosar av royndum.

- Av teimum 15 børnunum, sum búðu í Hesti, tá eg vaks upp, eru bert tvey búføst í Hesti í dag, restin býr aðrataðni.

- Skulu tey ungu trívast í Hesti, so mugu tey búgva har, eisini tá tey ganga í skúla í Havn og skal hetta lata seg gera, so má Teistin leggja at í Hesti um morgunin tíðliga eisini, sigur hann.

## Skelkað av sandoyingum

- Vit eru rættuliga skelkað av útspælinum hjá sandoyingum við Páll á Reynatúgvu, tingmanni, á odda. Hestoy og Sandoy hava altíð verið knýttar saman í samferðslunetinum og tá avgerð varð tikin um at smíða nýggja sandoyarferju, kom ongantíð upp tal, at Teistin ikki skuldi sigla í Hest teir týdningarmiklastu túrarnar á degnum, sigur Hallur Johannesen.

- Fyri mær sær tað út sum, at Páll á Reynatúgvu hevur sett sær sum persónligt mál at avtofta Hest, fyri at røkja egin áhugamál. Alternativið til, at Teistin ikki skal sigla um morgunin er, at nýtt nógv minni skip skal byggjast, og tá fáa vit als ikki part í stóra framstignum, sum Teistin saman við nýggju havnini í Hesti hevur givið okkum. Eg eri rættuliga irriteraður inn á gongdina seinastu vikurnar, og eg haldi, at sandoyingar eru dekan í stórlátaðir, ikki at kunna sita nakrar minuttir longur umborð á Teistanum, soleiðis at bæði sandoyingar og hestmenn kunnu fáa nakað burtur úr okkara nýggju og góðu ferju, sigur Hallur Johannesen.

- Og sjónarmiðið hjá Páll á Reynatúgvu um, at túrurin í Hest skal leingja ferðina við einum hálvum tíma, passar als ikki í øllum førum. Tá harður streymur er, og tað er hann also ein fittan part av árinum, so má Teistin liggja og banka eina góða løtu í mótstreymi, tá hann er komin um Halin og skal yvir Hestfjørð. Eg veit ikki hvussu tað er við Teistanum, men á eystfallinum og serliga á landsynningi, tá kom Tróndur næstan altíð heilt norð fyri bygdini, áðrenn hann legði yvir um fjørðin. Tá fekk hann viðstreym í Íðuni norður við Hestlandinum og undanstreym, tá hann var komin norður til bygdina. Og samstundis slapp hann undan rullinum, tí tað kann vera sera stórsjógvað suðuri í fjørðinum á eystfallinum, tá hann er landsynningur og tað rekur upp í ættina, sigur Hallur Johannesen.

## Frálíkt skip

Á næsta túrinum hjá Teistanum var fólkaflutningsleiðarin hjá Strandferðsluni, Poul Jákup Thomsen, saman við tekniska stjóranum á Strandferðsluni Magnus Magnussen. Teir hildu eyguni við skiparanum Eyðun Holm. Hann stóð við einum saligum smíli og stýrdi knøttunum og Teistin aktaði hansara minstu boð.

- Hetta er eitt veldugt skip, og tað roynist eisini sera væl, tá óslætt er. Sjálvt fólk, sum ræddust fjørðin í Sandoy og sum ongantíð hættaður sær yvir um, tá óslætt var, himprast ikki tí dag. Teistin rullar slett ikki og hetta er eitt sera trygt og manureriligt skip, sigur Magnus Magnussen, sum hevur verið við í hesum projektinum frá byrjan.

- Tá teknisku kanningarnar av Havnini í Hesti vóru royndar í einum modelli í Danmark høvdu teir gjørt ein feil við innsiglingina í Hesti, soleiðis at streymurin var alt ov harður, so harður sum hann ongantíð kann blíva í veruleikanum. Tað var ógjørligt at fáa modellið av Trónda inn í havnina. Hann endaði í syðra grótgarðinum hvørja ferð. Men ongin trupuleiki var hjá Teistanum, sigur Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni.